

NÝGGIR EIGARAR

*Benny Samuelsen, fyrrverandi blaðstjóri á Dimmalætting og Lisbeth L. Petersen, fyrrverandi partaeigari, saman við nýggju nevndarlimunum, Árna Ellefsen (v.m) og Petur Háberg Jacobsen*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

# Dimmalætting á »fremmandar« hendur

**BLAÐHEIMURIN** Í gjár hendi tað, sum fá høvdu ímyndað sær: 132 ára gamla Dimmalætting fekk nýggjar eigarar - gomlu eigararnir mistu yvir 30 milliónir krónur

Eirikur Lindenskov

Beinleiðis orsøkin til eigaraskiftið á Dimmalætting er, at raksturin hjá fyritøkuni seinastu árini hevur verið sera tungur - og tað bar av í 2008. Hetta árið einsamalt kostaði gomlu partaeigarunum góðar 27 milliónir krónur. Seinastu fimm roknskaparárini hava kostað gomlu partaeigarunum í P/F Dimmalætting góðar 30 milliónir krónur, sum er tann eginpeningur, sum tá var í felagnum.

**30 milliónir**

Gomlu partaeigararnir í P/F Dimmalætting hava mist góðar 30 milliónir krónur seinastu fimm árini. Partabrøvini eru seld fyri 0 krónur

Eginpeningurin var við ársbyrjan í ár negativur við einari góðari millión.

Á aðalfundinum í gjár legði øll nevndin frá sær. Partapeningurin varð niðurskrivaður til 0 krónur. Tað merkir tað sama sum, at øll partabrøvini í P/F Dimmalætting vórðu seld fyri 0 krónur. Keypari er Íløgufelagið Løkir, sum við handlinum skjýtur tvær milliónir í felagið, so tað aftur fær positivan eginpening, so fyritøkan kann koyra víðari.

Í gomlu nevndini í P/F Dimmalætting sótu Árni Joensen, formaður, Lisbeth L. Petersen, Bjarne Steen Pedersen, Schuman Hjaltalin og Heini Gaard.

Í nýggju nevndini sita Líggjas í Bø, nevndarformaður, Petur Háberg Jacobsen, Bergur Poulsen, Árni Ellefsen og Christian Nagata.

Við hesum er tíðarskeiðið hjá Samuelsen-familjuni á Dimmalætting søga. Familjan hevur stýrt Dimmalætting, sum í nógv meira enn 100 ár var nógv størsta blað í Føroyum. Tað var Andras Samuelsen, fyrsti løgmaður Føroya eftir heimastýrislógina og formaður Sambandsfloksins, sum keypti upp partabrøv í Dimmalætting soleiðis at hann fekk meirilutan.

Í 1936 varð sonur hansara, Georg L. Samuelsen settur sum blaðstjóri, og røkti hann starvið til 1985. Síðani tá hava aðrir eftirkomarar hjá Andrasi Samuelsen í blaðstjórastarvinum verið: Benny L. Samuelsen, Beate L. Samuelsen, Georg L. Petersen og Ingi L. Samuelsen.

Úrslitið hjá P/F Dimmalætting í fjør var eitt hall upp á 1.880.000 krónur. Eginpeningurin er sambært roknskapinum minus 1.058.000 krónur.

Høvuðspartaeigarar í P/F Dimmalætting - tað eru tey, sum eiga meira enn fimm prosent av partapeninginum, vóru: Lisbeth L. Petersen, Beate L. Samuelsen, NOTIO og P/F Dimmalætting.

Fyrraárið keypti P/F Dimmalætting partapeningin hjá Peter F. Christiansen, fyrrverandi fyritaksstjóra á Dimmalætting. Hann átti um fjórðingin av partapeninginum, og vórðu hesi partabrøv seld til starvsfólk, hinar partaeigararnar og til NOTIO, sum er íløgufelag hjá Eik. Við niðurskrivingini av partapeninginum, eru hesi partabrøv nú einki verd.

eirikur@sosialurin.fo

## Fakta

Íløgufelagið Løkir eigur nú allan partapeningin í Dimmalætting.

Tey, sum eiga Løkir, eru:

- P/F Føroya Banki
- P/F Tjaldur
- P/F Krúnborg
- Lækir Capital ehf í Íslandi



*Petur Háberg Jacobsen, nevndarformaður í P/F Løkjum, skrivar undir skjalið til Skráseting Føroya, sum vísir, at P/F Løkir nú eigur allan partapeningin í P/F Dimmalætting*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

## Fakta

### Blaðstjórar á Dimmalætting

| | |
|---|---|
| Árni Gregersen | 2007- |
| Ingi Samuelsen | 2002-2007 |
| Beate L. Samuelsen | 1995-2001 |
| Georg L. Petersen | 1995-2002 |
| Benny L. Samuelsen | 1981-1995 |
| Georg L. Samuelsen | 1936-1985 |
| Poul Niclasen | 1918-1936 |
| Oluf Skaalum | 1905-1918 |
| Chr. Heilskov | 1901-1902 |
| S. E. Müller | 1900-1901 |
| Enok D. Bærentsen | 1894-1900 |
| Emil Bruun | 1893-1894 |
| Jacob Johansen | 1889-1892 |
| Rasmus C. Effersøe | 1886-1889 |
| Rasmus C. Effersøe | 1902-1905 |
| H. C. Petersen | 1885-1886 |
| Louis Bergh | 1882-1885 |
| Oliver P. Effersøe | 1880-1882 |
| Oliver P. Effersøe | 1892-1893 |
| Lütje Lützen | 1878-1880 |

## Fakta

| | 2009 | 2008 | 2007 | 2006 | 2005 |
|---|---|---|---|---|---|
| Ársúrslit | -1.888.000 | -25.503.000 | -218.000 | -1.261.000 | -1.161.000 |
| Eginogn | -1.058.000 | 1.072.000 | 28.202.000 | 28.420.000 | 29.681.000 |